# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Framúr fótarbeiði

Eftir øllum at døma kom hvítur roykur úr FSF-húsinum í gjárkvøldið. Og eftir øllum at døma eitur komandi føroyska landsliðsvenjarin í fótbólti Colin Calderwood.

Hetta boðar frá einum stílskifti innan føroyskan fótbólt, har danski venjaraskúlin annars hevur verið tann heilt dominerandi, síðani farið var upp í altjóða fótbólt. Nakað sum heldur ikki er ónáttúrligt, tá føroyska venjaraútbúgvingin er samskipað í neyvum samstarvi við DBU.

Enn eru ikki allar súður syftar, men valið við Calderwood tykist vera sera spennandi. Men eins spennandi hevur tað verið at fylgt við í endaspurtinum, nú talið av kandidatum var skorið niður í bert tríggjar.

Tí veruleikin er helst eisini, at tað ongan tíð hava verið tríggir somikið spennandi og væl kvalifiseraðir kandidatar til starvið sum føroyskur landsliðsvenjari. Og her eigur Fótbóltssambandið stórt rós uppiborið fyri forarbeiðið, sum er gjørt.

Við hesum hevur FSF eisini víst, at tað ber til at selja og branda Føroyar, um hetta bara verður gjørt á rættan hátt. Uttan at avmarka seg sjálvan hevur FSF sett krøv og ynski til ein komandi landsliðsvenjara upp, og hetta er eftir øllum at døma gjørt somikið lokkandi, at hópur av væl skikkaðum umsøkjarum hava leitað móti avbjóðingini. Og tað at kapprenningin at enda stóð millum tríggjar venjarar úr trimum ymiskum londum boðar væl eisini frá breiðu undirtøkuni, sum hetta fótarbeiðið hevur givið úrslit í.

Um so valið av Colin Calderwood er tað rætta, kann bert eftirtíðin vísa. Men fyri at eydnast er fyrsta fortreytin, at fyrireikingarnar eru góðar.

Og tað ger ikki úrslitið verri, at valið fall á Skotland, har vit hava sterk mentanarlig bond. Og hvør veit, um vit ikki eisini fáa skotska mótstøðu fyri fimtu ferð á rað, tá lutur verður kastaður um komandi EM-undankappingina.

So fyri fyrst er at siga tillukku til FSF og eitt stórt Welcome to Colin Calderwood.

**Sosialurin**

## Svar til Randi S. Vang



**ANNA V. ELLINGSGAARD**
mentanarredaktørur, Sosialurin

Í lesarabrævi fýlist Randi S. Vang á, at Sosialurin hýsir listaummælum hjá Kinnu Poulsen, tí tey, eftir hennara tykki, ikki liva upp til journalistisk krøv.

Til hetta er at siga, at tað ongantíð hevur verið eitt krav til ummælir, at tey skulu liva upp til journalistisku krøvini um objektivitet, ið Randi S. Vang eftirlýsir.

Tvørturímóti fáa ummælir illa verið annað enn subjektiv, tá tey altíð umboða eina persónliga meining, sum sjálvandi eisini byggir á fakligt innlit.

Redaktiónin á Sosialinum hevur onga orsøk til at ivast í fakligu førleikunum hjá Kinnu Poulsen, og vit hvørki kunnu ella vilja stýra hennara meiningum.

At alt ov fáir skikkaðir listaummælarar í Føroyum tora ella tíma at siga sína erligu meining alment, kunnu vit skjótt blíva samd um. Hví hetta er so, er kanska ikki so torført at gita um.

## »Hví sleppi eg ikki í sama flokk sum hini?«



**ANNITA Á FRIÐRIKSMØRK**

Í brævi til kommunurnar sigur Mentamálaráðið, at "í kommunum har fleiri skúlar eru, verður tímajáttanin til fyrsta árgang gjørd við støði í samlaða næmingatalinum fyri allan árgangin í kommununi."

Avleiðingin er, at fría skúlavalið verður skert, og børn kunnu vera flutt millum skúlar. Hetta kom fram í útvarpi Føroya hóskvøldið 22. januar. Hetta hevur sjálvandi stórar avleiðingar fyri byrjunarundirvísingina hjá teimum børnum, sum ikki sleppa at verða saman við teimum børnum, sum tey hildu seg natúrliga komu í flokk saman við. Her kann verða talan um børn í grannalagnum, vinfólk osfr.

Tað kunnu verða tvinnar orsøkir til, at landsstýriskvinnan í mentamálum hevur tikið eina so vánaliga pedagogiska avgerð. Antin væntar hon, at avgerðin er so ógvuslig og skapar so nógv politiskt rumbul, at hon av hesi orsøk fer at fáa teir pengar í eykajáttan, sum nú mangla í. Ella hyggur hon, at fólkaskúlanum, sum var hann bara nøkur tøl, sum skulu fáast til at ganga upp.

Fyri at fáa greiðu á, hvat veruliga liggur aftanfyri avgerðina hjá landsstýriskvinnuni seti eg soljóðandi fyrispurningar fram:

- Hvussu ætlar mmr at skipa hetta nýggja átakið? Hvørjar treytir skulu uppfyllast og hvørji atlit verða tikin?
- Hvørjar kommunur hava tveir ella fleiri skúlar?
- Hvørjir av hesum skúlum fáa ikki hýst øllum teimum børnum, sum ynsktu at sleppa at ganga har?
- Hvussu nógv børn skulu vænta at fáa at vita, at tey mugu fara í annan skúla enn tann sum tey raðfestu sum nr 1.
- Hvørjar pedagogiskar avleiðingar hevur mentamálaráðið hugsað sær, at hetta fær fyri byrjunarundirvísingina hjá teimum næmingum, sum skulu í annan skúla, enn tann tey ynsktu at sleppa at ganga í.
- Heldur landsstýriskvinnan, at hetta kemur at ávirka trivnaðin og menningina hjá barninum, sum skal flyta skúla.
- Hvør skal taka avgerð um, hvør ella hvørjir næmingar skulu flyta.
- Hvørji atlit verða tá tikin?
- Hvørjar treytir, umframt næmingatalið, skulu uppfyllast fyri, at næmingarnir skulu sleppa undan at fara í annan skúla, enn tann tey ynsktu at sleppa at ganga í?
- Hvussu langt áðrenn skúlabyrjan fær barnið og foreldrini at vita, í hvørjum skúla tey skulu byrja í 1. flokki?

## Er sjálvgjørt vælgjørt?



**MARJUS DAM**
løgtingslimur
Sambandsflokkurin

Eldrapolitikkur: Tað kann ikki vera uppgávan hjá føroysku politisku skipanin at stýra so vánaliga, at føroyingar mugu flyta av landi, so danir koma at gjalda fyri føroyingar í Danmark heldur enn í Føroyum.

Seinastu árini eru fleiri røktarpláss komin til okkara eldru. Tó er langt eftir á mál. Vit sum dagliga starvast innan økið vita, at tørvurin er stórur. Tað mangla hundraðtalspláss kring landið. Samstundis eru fleiri staðir stórur tørvur á meiri heimahjálp at taka sær av røktarkrevjandi fólki, sum framvegis býr heima.

Tað er neyðugt at hesi viðurskifti verða fingin uppá pláss sum skjótast. Men skjótt merkir í fleiri førum - tá talan er um slíkt umráði – relativt langa tíð, tí í fleiri førum er neyðugt við langtíðarætlan. At gera hesi pláss merkir útreiðslur uppá 300 – 400 milliónir krónur – umframt rakstur.

Nú sita vit føroyingar íð eini sjálvgjørdari og sera truplari støðu. Fleiri loysingarflokkar kvettu 1/3 av ríkisveitingini burtur. Vit hava higartil mist umleið 3000 milliónir krónur. Vit hava eitt hall á fíggjarlógini uppá uml 500 milliónir krónur – og okkum tørvar stórar upphæddir til at taka okkum av hesum bleytu økjum – eins og fleiri øðrum økjum. Og vit hoyra í dag nógv tos um "strukturhall".

Skeiva avgerðin tá ger, at vit nú eins og komandi árini hava ein heilt óneyðugan trupulleika- nevniliga at okkum tørvar pening til at útbyggja okkara samfelag á at kalla øllum økjum.

Um vit skulu útbyggja okkara samfelag, meti eg soleiðis sum støðan er í dag, at rættast hevði verið at bøtt um skeivu avgerðina, ið varð gjørd fyri árum síðani - um tað letur seg gera.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.